Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Djóni N. Joensen, landsstýrismaður í útbúgvingarmálum

Evni: Lesandi og fráflyting

Spurningar:

1. Hvussu nógvir føroyingar hava lisið í Danmark hvørt einstakt ár seinastu 10 árini sambært nýggju dátunum hjá Hagstovuni tilsamans og skift á bólkar av lesandi?
2. Kann landsstýrismaðurin lýsa gongdina fyri lesandi føroyingar á hægri útbúgvingum í Danmark hvørt einstakt ár síðstu 10 árini sambært nýggju dátunum hjá Hagstovuni?
3. Hvussu nógv hava lisið á hægri útbúgvingum í Føroyum hvørt einstakt ár síðstu 10 árini?
4. Hvussu samsvara tølini hjá Studna við svarini upp á fyrstu spurningarnar í hesum fyrispurningi?
5. Um tølini frá Hagstovuni og Studna ikki líkjast, hvør kann so orsøkin vera til tað?

Viðmerkingar:
Í seinastuni hevur verið nógv tosað um fráflyting. Orðingin, Exit Føroyar, hevur aftur verið á breddanum, sum hon var tað fyri einum 10-12 árum síðani. Serliga KVF hevur sett kikaran á evnið. Talið á føroyskum lesandi í Danmark var 1.865 skúlaárið 2022/2023, sambært KVF, ið vísir til nýggjar dátur frá Hagstovuni. Hetta talið frá Hagstovuni hevur verið afturvendandi í kjakinum og miðlingini hjá serliga KVF.

Studni hevur í mong ár havt tøl fyri lestarstuðulsveitingar til lesandi í Føroyum og uttanlands. Hesi tøl hava givið eina greiða ábending um, hvar føroyingar lesa, og hvat føroyingar lesa. Hetta hagtalstilfar hevur eisini verið nógv nýtt, bæði í almennu fyrisitingini og í almenna rúminum. Hagtølini frá Studna vísa, at síðstu 10 árini er:

- Talið á føroyingum, sum eru undir hægri lestri í Føroyum og uttanlands, tilsamans lækkað úr 2.519 til 1.828. Ein lækking á 27%.
- Samlaða talið á hægri lesandi í Føroyum hækkað úr 838 til 1.026. Ein hækking á 22%.
- Samlaða talið á lesandi føroyingum undir hægri lestri í Danmark nærum hálverað. Tað er farið úr 1.423 niður í 732. Ein lækking á 49%.
- Hend tann broyting, at í skúlaárinum 2013/14 lósu 33% av teimum, sum lósu hægri lestur, í Føroyum. Í skúlaárinum 2023/24 lósu 56% av teimum, sum lósu hægri lestur, í Føroyum. 23% prosentstig fleiri.

Tað sýnist at vera stórur munur á tølunum frá Studna og tí talinum, sum KVF hevur frá Hagstovuni. Gott hevði verið at fingið greiði á, hvat er rætt. Tískil verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 31. januar 2025

Bárður á Lakjuni